# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Átrúnaður og fólkaræði í fokus

Vit hava áður her víst á eitt nýtt rák í norðureuropeisku samfeløgnum, nevnliga at átrúnaður og etikkur hava ein alt størri leiklut í politikki og almennum orðaskifti. Dømi eru eisini um, at hetta rák í ávísum førum knappliga er vorðið til øsing, har farið verður út um alt mark, sum kann góðtakast í fólkaræðiligum samfelag. Stutt sagt átrúnaðarspuringar, etiskir spurningar og kensluborin mál fylla nógv í europeiskum og serstakliga norðurlendskum fólkaræði og politikki. Spurningar verða settir við gomul og samtykt virði, og liberala demokratiið, soleiðis sum vit hava kent tað seinastu stórt hundrað árini er undir trýsti. Lagt skal verða afturat, at hetta trýst kemur ikki bert frá átrúnaðarligum síðum. Tað kemur eisini frá stórum og sterkum multinationalum skipanum, ið er uttan fyri vanligt demokratiskt eftirlit eins og hetta trýst stavar frá tí demokratiska undirskoti, ið eyðkennir stór lond og samveldi, eitt nú Rusland, USA og ES.

Tað eru tí nógvar og góðar grundir til at hava eitt støðugt og dygdargott samfelgasorðaskifti um allar teir mongu og álvarsomu spurningar, sum mugu verða settir orsakað av og í sambandi við alt hetta nýggja rákið. Vit hava øll ein stóran tørv á at fata, hvat tað er, sum hendir og hví alt hetta hendir júst nú. Altjóðaagerðin hevur nomið land í Føroyum. Vit eru uppá gott og ilt partur av alheiminum, og tað er tí bæði klókt og neyðugt, at vit læra at skilja tað, sum hendir í samfelagnum. Bestu ráð í so máta er orðaskifti, dialogur og upplýsing. Tað er við hesum í huga, at Miðlahúsið hevur boðið navnframa danska politikaranum, Naser Khader, og konu hansara, Bente Dalsbæk, at koma til Føroya fyrst í apríl mánaði. Naser Khader er 43 ár og útbúgvin búskaparfrøðingur. Hann hevur sitið á Fólkatingi síðan 2001 fyri Radikala flokkin, og hann hevur skrivað fleiri bøkur, har hann millum annað viðger islam og fólkaræði. Bente Dalsbæk er 40 ár, útbúgvin løgfrøðingur, og hon starvaðist 10 ár í Fólkatinginum.

Á ferðini fara hjúnini at halda fyrilestrar í Miðlahúsinum eitt nú um, hvar markið gongur millum átrúnað og fólkaræði: Hvussu nógv eigur átrúnaður at fylla í tí nýmótans samfelagnum? Er tað í lagi at bjóða átrúnaðinum av? Hví eru tær átrúnaðarligu kenslurnar viðkvæmari enn tær demokratisku? Eftir framløguna verður orðaskifti og høvi at seta spurningar. Fokus verður eisini sett á støðuna hjá tí donsku kvinnuna, sum gerst partur av einari muslimskari familju. Eftir framløguna verður kjak um leiklutin hjá kvinnum og um javnstøðu. Hjúnini eru kendir debattørar, og vitjanin gevur okkum eitt einastandandi høvi at kunna okkum við avgerandi og týdningarmiklar tættir av tí ráki, vit hava lýst omanfyri. Vitjanin hjá Naser Khader og Bente Dalsbæk er ein liður í eini røð av tiltøkum hjá Miðlahúsinum, har fólkaræðið er í fokus og har lagt verður upp til eitt upplýsandi og kveikjandi orðaskifti um hetta týdningarmikla evni og viðkomandi spurningar í hesum sambandi.

**Sosialurin**

## Íslendsk sendistova á donsku ambasaduni í Havn

HELGI ABRAHAMSEN



Eitt øðiligt kjak tók seg upp, nú tað gjørdist greitt, at Føroyar fáa egna sendistovu í Reykjavík. Loysingarskribentarnir vóru í øðini tá teir frættu, at føroyska og danska sendistovan skuldu halda til undir sama taki. Tílíkt má jú ikki henda. Tá ger tað minni, um talan er um onkra aðra sendistovu – tað má bara ikki vera tann danska.

Seinni kom fram, at hetta við at húsast í kjallaranum á donsku sendistovuni var ein íspunnin søga, og tí vóru kanónirnar snaraðar ímóti flaggstonginiuttanfyri sendistovuna, tí har skuldi danska flaggið veittra. Og so varð aftur eldur í skálanum.

**Fyrimunir og vansar**

Nú er tað soleiðis, at líkamikið um vit vilja tað ella ikki, so eru Føroyar partur av danska ríkinum. Hetta gevur okkum nógvar fyrimunir, men eisini nakrar vansar. Hin møguleikin er fullveldi, sum uttan iva eisini gevur bæði fyrimunir og vansar.

Hvør av hesum møguleikunum gevur fleiri fyrimunir, og hvør gevur fleiri vansar, eru vit ikki øll á einum máli um. Sjálvur eri eg ikki í iva um, at ríkisfelagsskapurin er nógv tann betra loysnin, men eg veit sjálvsagt, at tað eru onnur sum meina nakað annað.

**Vit hava frítt val**

Ein avleiðing av at vera í ríkisfelagsskapinum er, at vit hava ikki okkara egna uttanríkispolitikk. Tað er hetta sum forðar okkum í at hava sjálvstøðugar sendistovur undir føroyskum flaggi. Men Loysingarflokkarnir kunnu saktans stovna sjálvstøðugar føroyskar sendistovur hvar tað skal vera, um tað er tað, teir vilja. Tað krevur bara, at teir loysa Føroyar úr danska ríkinum og gjalda tað sum loysingin kostar. Tann møguleikan høvdu teir øll árini frá 1998 til 2003, tá teir høvdu meiriluta á Føroya Løgtingi, og hesin møguleikin varð eisini royndur í ólukkumát. Men teir góðust á hálvari leið, tí teir varnaðust, at vansarnir gjørdust ov nógvir og fyrimunirnir ov fáir. Teir vildu hava fyrimunirnar, men ræddust vansarnar. Tí bakkaðu teir út, og sita nú og grenja um vansarnar av at vera í ríkisfelagsskapinum. Hví loystu teir so ikki, tá teir høvdu møguleikan?

Tað vóru ikki sambandsfólk sum noktaðu teymum at loysa, tí tað høvdu vit ikki mandat til. Nei tað vóru teir sjálvir, sum ræddust sítt egna barn, og tann sum ikki torir at loysa, av ótta fyri avleiðingunum, má finna seg í at vera í ríkisfelagsskapinum – við teimum fyrimunum og vansum, sum tað hevur við sær.

**Íslandsk sendistova í Havn**

Meðan fullveldisføroyingar soleiðis øsa seg upp av tíðindunum um, at føroyski sendimaðurin í Reykjavík skal vera kjallarabúgvi á donsku sendistovuni har, so lata íslendingar upp eina sendistovu í Havn. Hon skal húsast í teirri aggomlu "Fútastovu", sum er gamli bústaðurin hjá einum donskum fúta, donskum sorinskrivara og donskum handilsforvaltara í Føroyum. Henda fornaldarliga danska "sendistova" í Føroyum er eftir øllum at døma eitt ríkiliga gott tilhaldsstað hjá sendimanninum fyri fullveldisríkið Ísland. – Eg meini so við – fyrimunir og vansar...

## Nøvn

EYÐUN Á BORG
Við navnakvøðu



Altjóða móðurmálsdagin sluppu vit aftur at eita Aage, Jacob o.s.fr.!?

Altjóða móðurmálsdagur var 21. februar. Í einum álmanakka stóð móðirmálsdagur!

Júst hendan dagin bórust tíðindini frá landsins stýri, at vit nú helst hava loyvi til næstan alt á navnaøkinum!?

Eita dreingirnir Áki ella Jákup, so kunnu vit vist nú broyta nøvnini til Aage (Åge) ella Jacob, sum langabbarnir kanska vórðu noyddir at eita!?

Eita genturnar Durita ella Malan, so ber nú helst til at broyta nøvnini til Dorthe ella Malene, sum langommurnar kanska vórðu noyddar at eita!?

(Orsakið meg, tit, sum eita so!).

Eru hetta ikki víðsjónir? Fólkið aftur sloppið úr hafti!?

Væl tíðað, Jacob!

Til lukku, Føroyar, mítt land!

Á Borg á Argjum ingigerðardag 2007

E.S. Grætur tú, land mítt, í hesum víðsjónatíðum? Aftur eitt bakkast, sigur tú?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.